Semingsuppskoti› ver›ur helst felt

Meginparturin av álitisfólkunum hjá føroysku lærarunum eru samd um, at semjan millum Lærarafelagi› og Fíggjarmálast‡ri› ver›ur vraka› vi› uratkvø›ugrei›sluni millum limirnar

JOHN JOHANNESSEN

Mangt bendir á, at úrsliti› av uratkvø›ugrei›sluni millum limirnar í Lærarafelagnum um semjuna millum Fíggjarmálast‡ri› og Lærarafelagi› ver›ur, at semingsuppskoti› ver›ur vraka›.

Sosialurin hevur tosa› vi› fleiri av álitisfólkunum hjá lærarunum kring landi›, og hava tey øll varhugan av, at úrsliti› av atkvø›ugrei›sluni ver›ur eitt heilt greitt nei til n‡ggja sáttmálan.

Høvu›sgrundgevingarnar fyri, at uppskoti› ver›ur felt, siga álitisfólkini vera, at lærarnir skulu taka stø›u til eina ókenda danska avtalu um ársverk, tímar og anna›, i› enn ikki er roynt í Danmark. Lærararnir skulu í veruleikanum taka stø›u til eina skipan, i› er smí›a› til donsk vi›urskifti, men sum kortini ikki er roynd í Danmark og heldur ikki a›rasta›ni.

Illa fyrireika›

Álitisfólkini hjá lærarunum eru samd um, at semingsuppskoti› er alt ov illa fyrireika› og tí eisini ógvuliga torført at taka stø›u til. Eitt av álitisfólkunum, i› vil vera ónevnt, vísir á, at danska áliti›, i› skal vera grundarlagi› undir einum parti av n‡ggja sáttmálanum, er púra ókent fyri limunum í Lærarafelagnum. Tí ver›ur ta› hildi› vera ógvuliga óheppi, at limirnir ikki eru kunna›ir nóg nógv um ta›. Áliti› er sent limunum, men ta› er ikki umsett og ongar nærri frágrei›ingar eru um ta›.

Harafturat vísa fleiri av álitisfólkunum á, at semingsuppskoti› sum heild er alt ov illa or›a› og ógreitt, og tí ber ikki til at taka nakra grei›a stø›u til ta›. Tí ver›ur vænta›, at festu limirnir fara at atkvø›a ímóti uppskotinum.

Hildi› ver›ur eisini, at ársverkini, lagt ver›ur upp til í uppskotinum, fer at eggja fleiri av limunum til at vraka uppskotinum. Fleiri av limunum eru ónøgdir um, at eftirlit skal haldast vi› teimum gjøgnum ársverkini, og sí›ani halda teir ta› eisini vera heilt burturvi›, at vit í Føroyum skulu hava eina skipan vi› ársverkum, i› eru tillaga› eftir arbei›inum hjá lærarum í Keypmannahavn.

Skúlin má virka aftur

Hóast meginparturin av føroysku lærarunum ikki tekur undir vi› sáttmálauppskotinum, halda álitisfólkini kortini, at ta› eru lærarar kring landi›, i› kenna seg noyddar at atkvø›a fyri tí. Orsøkina til hetta siga tey vera, at nógvir av lærarunum kenna á sær eina moralska skyldu fyri at fáa skúlan at virka aftur.

Lærararnir ásanna, at ta› kann fáa álvarsligar fylgjur fyri próvtøkurnar hjá næmingunum í níggjunda og tíggjunda flokki, um verkfalli› heldur fram, og rokna álitisfólkini vi›, at hetta kann fáa fleiri av lærarunum til at atkvø›a fyri uppskotinum.

Føroysku fólkaskúlalærararnir hava veri› í verkfalli sí›ani 8. mars.

Anfinn fær svar í dag

Danski forsætisrá›harrin fer í dag at svara brævinum, løgma›ur herfyri sendi honum um faktuella grundarlagi fyri ví›ari samrá›ingunum um føroyskt fullveldi

JOHN JOHANNESSEN

Á vikuliga tí›indafundinum í danska forsætisrá›num í gjár bo›a›i Poul Nyrup Rasmussen frá, at hann í morgin fer at senda løgmanni svar upp á brævi›, løgma›ur herfyri sendi sær um føroysku stø›una til faktuella fíggjarliga grundarlagi› undir ví›ari ríkisrættarligu samrá›ingunum.

Á fyrsta samrá›ingarfundinum, i› var› hildin 17. mars, gjørdust partarnir samdir um, at teir skuldu royna at fáa avklára› eitt felags faktuelt fíggjarliga grundarlag fyri ví›ari samrá›ingunum. Partarnir høvdu nevniliga hvør sítt faktuella grundarlag á fyrsta samrá›ingarfundinum. Ta› hjá landsst‡rinum bygdi á búskaparpartin av Hvítubók, me›an danska fíggjarmálará›i› hev›i gjørt nakrar útrokningar, i› s‡ndu, hvat føroyingar kosta dønum. Í hesum roknistykki var eisini gjørt upp, hvat føroyingar búsitandi í Danmark kosta danska statinum.

Sí›ani hesa avtalu, hava føroyingar og danir hvør í sínum lagi arbeitt vi› at finna hetta felags faktuella grundarlag, og 13. apríl sendi løgma›ur danska forsætisrá›harranum bræv, har hann vísir á, at tvey tey fyrstu av teimum f‡ra punktunum í uppstillingini hjá danska fíggjarmálará›harranum kunnu sammetast vi› útrokningarnar í Hvítubók, me›an løgma›ur tekur frástø›u frá hinum bá›um punktunum.

Tey bæ›i punktini í danska roknistykkinum, løgma›ur sigur seg kunna taka undir vi›, eru útrei›slurnar av blokkstu›ulinum til Føroya og útrei›slur hjá statsligum myndugleikum í Føroyum. Men løgma›ur tekur als ikki undir vi› útrokningunum um útrei›slur av donskum pensjónum til Føroya, og heldur ikki tekur hann undir vi› útrokningunum um útrei›slur av føroyingum í Danmark.

Løgma›ur ger vart vi›, at hann tilskilar sær rætt at leggja onnur tøl á bor›i› undir ví›ari samrá›ingunum og vísir á, at hann væntar svar frá Nyrup, um hann ikki tekur undir vi› sjónarmi›um í brævi landsst‡risins. Hetta svar fær Anfinn Kallsberg í dag.

Mynd: Jan Müller

Væl nøgdir vi› fyrsta túrin

Hanus Hansen, stjóri á JFK-Trol, er væl nøgdur vi› fyrsta túrin hjá risatrolaranum, Nærabergi

JOHN JOHANNESSEN

Leygardagin kom størsti trolarin í føroyska flotanum, Næraberg, á Klaksvík vi› 630 tonsum av surimi og 240 tosnum av mjøli. Næraberg hevur veri› til fiskiskap í tilsamans 40 dagar á sínum fyrsta túri. Sjálvur túrurin vardi kortini eitt sinur longur, orsaka› av trupulleikum vi› spæl útger›ini. Men rei›arin er væl nøgdur vi› úrsliti›.

– Hesin túrurin hevur s‡nt okkum, at ta› nokk skal fara at bera til vi› Nærabergi. Eg eri vísur í, at ta› fer at bera til, hóast manning á 72 fólk gevur nógvar lønarútrei›slur, sigur Hanus Hansen, stjóri á JFK-Trol.

Í gjár fóru menn at landa Næraberg, og ætlanin er, at hann skal fara avsta› aftur til fiskiskap hósdagin.

Friðalig høgtíð

Politistøðirnar kring landið siga frá friðaligum páskum. Einki stórvegis út yvir tað vanliga hevur verið á skránni, verður sagt

EDVARD JOENSEN

Í Klaksvík bakkaði ein bilur á ein annan um páskirnar. Bilførarin rýmdi, men kom tó aftur seinni. Tá tosaði løgreglan við mannin, sum var ávirkaður av rúsdrekka. Okkurt smávegis kom upp á bilarnar, verður sagt av politistøðini í Klaksvík.

Um skírishalguna var eitt heldur álvarsligari ferðsluóhapp í Klaksvík, har tveir bilar stoyttu saman. Onkur persónur varð fluttur á sjúkrahúsið, men sum skilst á vakthavandi í Klaksvík var eingin stórur mansskaði. Men bilarnir fóru illa. Annar varð tikin á politistøðina, og skuldi kannast á Bileftirlitinum, tá Sosialurin tosaði við politistøðina í Klaksvík í gjár. Heilt greitt var ikki, hvør orsøkin til óhappið var, men sagt varð av politistøðini, at líkt var til, at tað var kappkoyring. Millum hús.

Annars hevur løgreglan í Klaksvík steðgað nógum bilum á páskum, men har var alt, sum tað átti.

Í Havn sigur løgreglan frá trimum tilburðum við húsaófriði mikukvøldið í páskavikuni. Nakað av fullum fólki hevur verið í býnum um høgtíðina, og okkurt smávegis herverk hevur eisini verið. Onkur rútur er brotin og tílíkt, sum ofta fylgir við fullum fólki, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

Um skírishalguna vóðru ferðslukanningar gjørdar. Skírisdag var løgreglan inni á Sundi við radaranum. Har vórðu tríggir, sum koyrdu so skjótt, at koyrikorti verður tikið. Tveir koyrdu 118 kmt., meðan ein var heilt uppi á 148 kmt. Langafríggjadag vórðu kanningar gjørdar millum rundkoyringina í Kollafirði og bergholsmunnan. Har var ein, sum náddi 111kmt. og tí eisini kann vænta at missa koyrikortið.

Í aðrar mátar var friðaligt, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn. Sama hevur verið aðrastaðni í landinum.

Eitt heldur álvarsligari ferðsluóhapp var í Klaksvík um skírishalguna, har tveir bilar stoyttu saman. Onkur persónur varð fluttur á sjúkrahúsið, men sum skilst á vakthavandi í Klaksvík var eingin stórur mansskað

Mynd: Jan Müller

Ásetingar gerast fyri fólkaheilsu og djóraheilsu

Av tí, at nærum allur útflutningur Føroya er fiskavørur, er sera gagnligt við slíkum sáttmálum, ið áseta góðsku- og reinføriskrøv, sigur Anfinn Kallsberg m.a. í viðmerkingunum til uppskot um heilsufrøðilig viðurskifti við ES

ÓLAVUR Í BEITI

– Við atliti at gongdini fram móti øktum altjóða handli – her uppi í handli við matvørum – verða karmar tilevnaðir soleiðis, at ásetingar verða gjørdar fyri matvørutrygd, fólkaheilsu og djóraheilsu, bæði í altjóðasáttmálum og økissáttmálum. Limalondini í Altjóðahandilsfelags-skapinum (WTO) hava eisini á heilsufrøðiliga økinum bundið seg til at laga lóggávu sína til meginreglurnar í WTO sáttmálunum.

– Av tí, at nærum allur útflutningur Føroya er fiskavørur, er sera gagnligt við slíkum sáttmálum, ið áseta góðsku- og reinføriskrøv. Umframt at minka um smittuvanda í handli við matvørum, hava slíkir sáttmálar til endamáls at forða fyri, at handil millum lond verður darvaður av tøkniligum krøvum, ið eingi heilsufrøðilig fyrilit hava, sigur løgmaður m.a. í viðmerkingunum til uppskotið.

Ísland og Noreg

Og Anfinn Kallsberg upplýsir, at næstu kappingarneytar okkara – Ísland og Noreg – hava skipað hesi viðurskifti við Evropasamveldið (ES) soleiðis, at teir eru vorðnir partar av heilsufrøðiliga samstarvinum í Evropa gjøgnum EBS.

– Hóast Føroyar eru uttan fyri bæði ES og EBS og útflyta nærum allar okkara vørur til ES marknaðin, hava vit verið fyri stórari ávirkan av gongdini í ES á hesum øki. Ein treyt fyri at kunna kappast við onnur lond er, at støðið á bæði virkjum og framleiðslu, tá talan er um reinføri og góðsku, í minsta lagi er javnbjóðis við tað, sum er í grannalondum okkara. Umframt at føroysk virki og framleiðsla sum heild eru á sama støði sum í londunum kring okkum, fylgja Føroyar eisini minstukrøvum WTO hesum viðvíkjandi.

Óheppin árin

– Tað, at Føroyar ikki hava verið partur av heilsufrøðiliga samstarvinum í Evropa hevur havt heldur óheppin árin við sær á føroysku vinnuna, serliga í mun til vinnuna í okkara grannalondum. Her kann millum annað nevnast økt eftirlit við ES markið, har prosentvísi parturin av vøru, ið verður kannaður, er nógv størri enn hjá londum, ið eru partar av heilsufrøðiliga samstarvinum. Avmarkingar í mun til havnir, sum kunnu nýtast sum móttøkuhavnir, hevur eisini verið ein stórur trupulleiki.

– Tískil hevur Føroya Landsstýri havt sum mál at finna ein hóskandi leist fyri Føroyar í heilsufrøðiliga samstarvinum í Evropa. Tað er gjørt bæði fyri at bøta um umstøðurnar hjá føroyskum fiskavøruútflytarum og at tryggja okkum sjálvum og øðrum, at góðska og heilsutrygd í framleiðslu av matvørum í Føroyum er minst á sama støði sum í teimum londum, vit hava samhandil við, sigur Anfinn Kallsberg.

Broytingar

– Broytingarnar í verandi støðu verða tískil, at Føroyar skulu einki forboð hava fyri innflutningi av livandi djórum ella djóraúrdráttum úr ES londum og kunnu heldur ikki steðga vørum á markinum inn til Føroya fyri at taka royndir. Afturat hesum verða Føroyar at rokna sum ES mark fyri heilsufrøðiligum eftirliti av djórum og djóraúrdráttum, sum flutt eru inn til Føroya frá triðjalondum

– Í sambandi við útflutning frá Føroyum til ES, verða somu treytir fyri samhandli millum ES limalond á heilsufrøðiliga økinum galdandi fyri fiskavørur og alivørur (har uppi í livandi fiskur), tvískjelja lindýr, fiskamjøl ætlað til djórafóður og óvirkað ull úr Føroyum, sigur løgmaður í viðmerkingunum.

Eftir innbjóðing frá ES-nevndini verður høvi hjá Føroyum at luttaka sum eygleiðari á fundum í arbeiðsbólkum í ES, har spurningar um heilsufrøðilig krøv til fiskivinnu verða viðgjørdir. Ætlanin er, at tilmælið verður lagt fyri felagsnevndina Føroyar-EF til endaliga góðkenning á árliga fundinum í juni 2000 í Tórshavn.